# Toyota-stjóri fekk av at vita

Stjórin í japonsku bilverksmiðjuni Toyota fekk av at vita, tá hann var til hoyringar í amerikonsku Kongressini í gjárkvøldið. Stjórin, sum eitur Akio Toyoda, var komin í Kongressina at svara spurningum í sambandi við, at japanska verksmiðjan hevur kallað meiri enn átta milliónir bilar innaftur, tí teir vístu seg ikki at vera í lagi. Hann segði, at verksmiðjan átekur sær fulla ábyrgd teimum óhappum, sum brekini hava verið atvoldin til. Í løtuni verður kannað, um 30 ferðsluvanlukkur við Toyota-bilum kunnu setast í samband við tey teknisku brekini.



# Bispur var fullur

Margot Kässmann, sum hevur verið biskupur hjá protestantunum í Týsklandi, hevur lagt frá sær, eftir at hon bleiv tikin fyri rúsdrekkakoyring seinasta vikuskiftið. Í gjár bað hon um umbering fyri misgerð sína og boðaði samstundis frá, at hon hevur sagt biskupsembætið frá sær. Margot Kässmann, sum hevur verið leiðari fyri teimum týsku protestantunum seinastu tíggju árini, var 41 ára gomul, tá hon gjørdist biskupur og tann yngsti biskupurin í Týsklandi nakrantíð. Tað vakti stóran ans, tá hon í 2007 kravdi skilnað frá manninum, og í dag er hon einlig mamma við fýra børnum.

# Silo'in á Drelnesi verður veruleiki

**Tað hevur tikið sína tíð, men nú bendir mangt á, at verkætlanin við saltsilo'ini á Drelnesi gerst veruleiki**

MENTAN
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**FAKTA**

Modellið Drelnes í byggilist var í hevd í 1920- og 1930-árunum í Italia og serliga í Frankaríki.
Saltsiloin varð reist í 1937 eftir franskari tekning, og suðuroyingurin, Óli Johansen, sum selur fisk annanhvønn fríggjadag í Gongugøtuni í Havn, sigur seg vita um ein fransmann, sum hevur staðið oman fyri túnið hjá honum á Tanganum og tikið myndir av Drelnesi.
Ja, lat okkum suðuroyingar rópa siloina Drelnes, tí soleiðis eitur hon – ella soleiðis æt hon fyrr.
(Kelda: www.tvoroyri.fo)

**Drelnes:** - Fyrireikingarnar til "Verkætlan SALT" eru komnar rættiliga langt, sigur Kristin Michelsen, borgarstjóri á Tvøroyri.

- Ja, so langt eru arbeiðið komið, at fyrireikingar nú eru gjørdar til at stovna ein serstakan silo-grunn, vísir borgarstjórin á.

Hesin grunnurin skal hava yvirskipaðu ábyrgdina av at umbyggja silo'ina og reka hana, tá hon stendur liðug.

Fyrrverandi íslendski forsetin, Vígdis Finnbogadóttir er verji hjá ætlanini. Og uttan hennara virkna leiklut var henda verkætlanin neyvan komin undir land.

Verkætlanarleiðarin, Ólavur Rasmussen hevur ikki hug at gera stórvegis viðmerkingar um hetta málið.

Tað einasta, hann vil siga er: "Tað sær gott út!"

Verkætlanin SALT miðar eftir at umskapa gomlu saltsilo'ina til ein sannan katedral til bæði sjónleik, tónleik og onnur mentanartiltøk.



*Ætlanin at umskapa saltsilo'ina á Drelnesi til ein sannan mentanarkatedral er nú komið so væl áleiðis, at í næstum verður ein serstakur silo-grunnur stovnaður*

# Má varðveitast

**Tíðin er nú komin til at varðveita henda bygning og geva honum annað innihald. Tað ber til at varðveita skapið og nútímansgera bygningin uttan og innan, hevur Albert Isfeldt, arkitektur sagt í sambandi við hetta málið**

SILO
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Drelnes:** - Her eru óteljandi møguleikar í tí høga rúminum at skapa karmar um alskyns mentanarvirksemi sum til dømis tónleik, sjónleik, listaframsýningar, fundir av ymiskum slag og øðrum við, vísir hann á.

Á heimasíðuni hjá Tvøroyrar kommunu greiðir hann - sum privatpersónur - frá, at líkt er til, at eingin veruliga hevur gjørt átøk til tess at varðveita hetta stórverk, sum beint nú stendur og forfellur.

Men, vísir hann á, røddir hava verið frammi í bløðunum og millum fólk í Suðuroynni at fremja tiltøk til tess at varðveita bygningin.

- Helst hevur tað undrað mong byggi- og søgufólk, sum eru komin ferðandi hendavegin, at onki er gjørt fyri at fjálga um henda bygning.

- Mær kom til hugs Kirkjubømúrurin. Her hevur kjakið gingið, um múrurin er ein ruin (fornfrøðingarnir), ella um múrurin er eitt bygningsverk (arkitektarnir). Vóni ikki, at tílíkt kjak verður um Saltsiloina á Drelnesi, ella uppaftur verri, at siloin verður niðurtikin sum eitt »skrímsl«, sum onkur hevur málborið seg, sigur Albert Isfeldt í greinini.

## Spara milliónir

Fíggjarliga er hetta eitt skilagott tiltak. Útgrevstur og høvuðskonstruksjón eru tøk.

- Hetta kann merkja eina sparing í byggiútreiðslum uppá einar fimm til tíggju milliónir krónur, leysliga mett.

Nýggja ferjulegan og ein nýggjur Smyril, sum leggur at beint við, fara at draga tiltøk til sín úr øðrum pørtum av landinum.

Við tunnlinum millum Øravík og Hov er øll Suðuroyggin samanbundin á ein hátt. So tað ber til at siga, at Siloin á Drelnesi kann blíva ein mentanarkatedralur fyri alla oynna, bara allar góðar kreftir savnast í einum felags átaki hesum at frama.

Nevnast kann, at nýggja mentanarhúsið í Fuglafirði hevur havt avgerandi týdning fyri mentanartiltøk í bygdini og fyri alla Eysturoynna og er blivin eitt hugtak um alt landið eins og Norðurlandahúsið.

- Vónandi verður hetta uppskot til veruleika einaferð, so hesin bygningur sum ein fuglurin Føniks aftur verður at daga upp í luftina í fullum skrúði sum karmur um mentanartiltøk í Suðuroynni, sigur Albert Isfeldt m.a. í greinini.


**Stjóraskifti á Havstovuni**
**Almenn móttøka**





**Almenn móttøka verður á Havstovuni fríggjadagin 26. februar, kl. 15[00] - 17[00]**

Í sambandi við at Hjalti í Jákupsstovu fer frá sum stjóri á Havstovuni og Eilif Gaard tekur við stjórastarvinum, bjóðar Havstovan til almenna móttøku.

**Øll eru hjartaliga vælkomin**

**Hjalti í Jákupsstovu**
hevur verið stjóri á Havstovuni síðani 1988, og hevur sostatt røkt stjórastarvið í 22 ár, nú hann fer frá fyri aldur.

**Eilif Gaard**
er doktari í havlívfrøði og hevur starvast á Havstovuni síðani 1987.

HAVSTOVAN
FAROE MARINE RESEARCH INSTITUTE

P.O. Box 3051 · Nóatún 1
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel +298 35 39 00
hav@hav.fo
www.hav.fo